## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og útnyrðingi og ælingur. Um kvøldið lækkar hann niður í útsynning. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og regn. Hitin millum 6 og 9 stig. Seinnapartin hækkar hann upp í útnyrðing og ælingur, partvís vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin fellur niður í eini 3 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hvassur vindur ella skrið av útnyrðingi og kavaælingur, men kanska onkur sólglotti. Hitalagið millum frostmarkið og ÷3 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin skrið ella stormur av norði og kavaælingur, sunnudagin minni vindur og sólglottar, men okkurt kavaælið. Hitalagið millum ÷1 og ÷5 stig.

# Salong Tóta skift eigara

**Ein tann best kenda frisørsalongin í Havn, Salong Tóta, skiftir nú eigara. Paula Mc Gavin á Argjum hevur leigað hølini og yvirtikið driftina av salongini í M. Heinasonargøtu**

EIGARSKIFTI
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Starvsfólkini hjá Salong Tótu, f.v.: Eydis Næss, Astrid Magnussen, Paula Mc Gavin, Katrin Jákupsdóttir og Tóta Sørensen. Heidi Nattestad og Bjørg Jacobsen vanta á myndini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Eftir 45 ár í frisørbransjuni hevur Tóta Sørensen nú tikið avgerð um at leiga hølini til Paulu Mc Gavin á Argjum, sum hevur yvirtikið driftina av salongini M. Heinasonargøtu. Tóta fer tó framvegis at arbeiða á salongini.

Poula Mc Gavin er 25 ára gomul. Hon lærdi til frisør hjá "Kvilt Hárfríðkan" á Áarvegnum og arbeiddi síðan sum sjálvstøðug hjá "SaxO´føn" í J. Paturssonargøtu.

Tóta Sørensen eigur framvegis bygningin, har frisørsalongin hevur hildið til síðan 1987.

Tóta lærdi til frisør hjá Juttu Andreasen á "Glade Hjørn" frá 1960-64. Síðan arbeiddi hon sum frisør í Danmark í fimm ár. Tá hon kom heim aftur í 1969, fekk hon sær egna frisørsalong í J. C. Svabosgøtu í Havn. Har var hon til 1977, tá hon flutti inn í Voguebygningin í M. Heinasonargøtu. Í 1987 flutti hon inn í egnan bygning við nýggjari salong í somu gøtu.

Tóta hevur gingið á odda í arbeiðinum at menna hárfríðkanarfakið í Føroyum og var við til at stovna Hárfríðkanarfelagið, har hon hevur verið í nevndini og var formaður í nógv ár.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 8 |
| Nuuk | -1 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 5 |
| Tromsø | -2 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | -3 |
| Moskva | -3 |
| Berlin | -1 |
| Warzawa | -1 |
| Kiev | -3 |
| Bukarest | 1 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 7 |
| Róm | 9 |
| Malorca | 9 |
| Athen | 13 |
| Malta | 12 |
| Tunis | 11 |
| Beijing | 8 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 12 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | -- |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 21 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1037 hPa. vestan fyri Skotland stendur mestsum í stað og mennist. Eitt lágtrýst, 1008 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer eystureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikunáttina.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing og dýpist. Kuldabrúgvin haðani verður væntandi við Føroyar hósdagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 7/3 kl. 06⁰⁰– 8/3. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,7°
Minsti hiti máldur í mars: -8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 7/3 kl. 06⁰⁰– 8/3 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 2,4 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

9. mars

3. mars Seinna kvarter
8. mars Mánin næstur jørðini
10. mars tendring

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. mars | 05.39 | 18.05 | 04.39 | 17.05 | 04.54 | 17.20 | 07.39 | 20.05 | 08.39 | 21.05 | 03.54 | 16.20 | 02.54 | 15.20 | 05.54 | 18.20 | 06.54 | 19.20 | 05.24 | 17.50 | 06.39 | 19.05 |
| 10.mars | 06.29 | 18.53 | 05.29 | 17.53 | 05.44 | 18.08 | 08.29 | 20.53 | 09.29 | 21.53 | 04.44 | 17.08 | 03.44 | 16.08 | 06.44 | 19.08 | 07.44 | 20.08 | 06.14 | 18.38 | 07.29 | 19.53 |
| 11.mars | 07.16 | 19.39 | 06.16 | 18.39 | 06.31 | 18.54 | 09.16 | 21.39 | 10.16 | 22.39 | 05.31 | 17.54 | 04.31 | 16.54 | 07.31 | 19.54 | 08.31 | 20.54 | 07.01 | 19.24 | 08.16 | 20.39 |
| 12.mars | 08.01 | 20.24 | 07.01 | 19.24 | 07.16 | 19.39 | 10.01 | 22.24 | 11.01 | 23.24 | 06.16 | 18.39 | 05.16 | 17.39 | 08.16 | 20.39 | 09.16 | 21.39 | 07.46 | 20.09 | 09.01 | 21.24 |
| 13.mars | 08.46 | 21.09 | 07.46 | 20.09 | 08.01 | 20.24 | 10.46 | 23.09 | 11.46 | - | 07.01 | 19.24 | 06.01 | 18.24 | 09.01 | 21.24 | 10.01 | 22.24 | 08.31 | 20.54 | 09.46 | 22.09 |

5 707265 100036 >